FØROYA LØGMAÐUR

Tinganes 16. apríl 2020

Føðingardagskvøða til hennara hátign Margrethu drotning

Vegna føroysku stjórnina og alt Føroya fólk er tað mær ein heiður at ynskja tygara hátign hjartaliga til lukku við áttati ára føðingardegi tygara. Tað vildi verið ynskiligt, at umstøðurnar vóru øðrvísi, soleiðis at til bar at hátíðarhalda tygum á rættan hátt.

Nú liva vit tó í eini tíð við koronafarsóttini og mugu tillaga okkum hareftir. Í hesi heilt óvanligu tíð, hava tygum tignarliga megnað at sameint kongsríkið um at standa saman um at basa smittuni. Sosiala fráveran er trupul og rakar eisini nógva persónliga sambandið millum Føroyar og Danmark. Fólk kunnu ikki longur á sama hátt ferðast millum londini at síggja síni kæru. Allur heimurin er tó í sama báti, og vit síggja ljós fyri stavn. Tað kemur ein tíð, tá vit aftur í nærveru kunnu gleðast saman við okkara kæru her heima og í Danmark.

Løgtingið og landsstýrið hava fyrireikað eina gávu frá Føroyum í sambandi við føðingardag tygara. Okkara vón er, at vit fáa møguleikan at handa tygum gávuna til nærri hóskandi hóvi, tá umstøðurnar vónandi aftur loyva tí. Í dag fara Føroyar at luttaka í hátíðarhaldið tygara umvegis sjónvarpið og sameinandi fjálgandi felagssangin, sum býr í føroysku og donsku fólkasálini. Vit ynskja tygum ein minniligan dag saman við tygara kæru og eitt gott kvøld.

Við hávirðing

Bárður á Steig Nielsen

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo